Vikuskiftis Sosialurin



JA


Óli Breckmann


Poul Michelsen


Heðin Zachariasen


Edmund Joensen


Kaj Leo Johannesen


Lisbeth L. Petersen


Olav Enomoto


Johan Dahl


Andrias Petersen


John Johannessen


Annita á Fríðriksmørk


Heidi Petersen


Tórbjørn Jacobsen


Finnur Helmsdal


Høgni Hoydal


Karsten Hansen


Bill Justinussen


Jenis av Rana


Kári P. Højgaard

# Føroyingar fyri einum valdømi

**Ein Gallup-kanning, sum Sosialurin hevur bílagt, vísir, at meiri enn helmingurin av føroyingum er fyri einum valdømi. Eisini í tinginum er greiður meiriluti fyri einum valdømi.**

EITT VALDØMI

*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

| Skulu Føroyar vera eitt valdømi? | Total |
|---|---|
| Ja | 54% |
| Nei | 26% |
| Veit ikki | 20% |
| | 100% |

| Skal spurningurin um Føroyar sum eitt valdømi sendast út til fólkaatkvøðu? | Total |
|---|---|
| Ja | 46% |
| Nei | 45% |
| Veit ikki | 9% |
| Grand Total | 100% |

| Nær metir tú tað vera skilabest at avgreiða spurningin um Føroyar sum eitt valdømi? | Total |
|---|---|
| Eftir komandi løgtingsval | 43% |
| Fyri komandi løgtingsval | 45% |
| Veit ikki | 12% |
| Grand Total | 100% |

Viðmerkjast skal, at fyrivarni eigur at verða tikið fyri smærri broytingum, tí úrslitini av kanningini eru ikki fíntald og vektað enn.

Ein kanning, sum Gallup Føroyar hevur gjørt fyri Sosialin, staðfestir, at ein greiður meiriluti av føroyingum eru fyri einum valdømi. Bert ein fjórðingur sigur seg vera ímóti, meðan meiri enn helmingurin sigur seg vera fyri. Restin sigur seg ikki vita.

Av tí, at kanningin varð bíløgd áðrenn Edmund Joensen, løgtingsformaður, hevði lagt uppskotið um eitt valdømi fyri tingið, varð spurningurin um málið eigur at sendast til fólkaatkvøðu eisini settur. Her stendur á jøvnum millum ja og nei, meðan ein tíggjundapartur segði seg ikki vita.

Eisini var spurningurin um nær fólk halda tað vera skilabest at avgreiða spurningin um eitt valdømi. Har vóru valmøguleikarnir fyri og eftir løgtingsvalið, og veit ikki, og eisini her stóð úrslitið á jøvnum, meðan 12 prosent segði seg ikki vita.

Viðmerkjast skal, at fyrivarni eigur at verða tikið fyri smærri broytingum, tí úrslitini av kanningini eru ikki fíntald enn.

Í næstu viku fara vit at hyggja nærri at kanningini, sum Gallup Føroyar hevur gjørt fyri Sosialin. Eitt nú, aldurs- og kynsbýtið, og ikki minst, hvussu býtið er kring landið.

## Meiriluti í tinginum

Í mai í ár ringdu vit til allar tinglimir, at vita, hvør var fyri, og hvør var ímóti einum valdømi. Tá var úrslitið, at 16 vóru fyri og 11 vóru ímóti. Fýra høvdu ikki tikið støðu enn, og ein vildi ikki svara. Tá vit í dag ringu til teir, sum ikki høvdu tikið støðu tá, var greitt, at 19 er fyri, meðan 12 eru ímóti. Henrik Old svarar av prinsipp ikki slíkum spurnarum-førum.

NEI


Anfinn Kallsberg


Jógvan við Keldu


Jørgen Niclasen


Kjartan Joensen


Alfred Olsen


Marjus Dam


Gerhard Lognberg


Kristian Magnussen


Vilhelm Johannesen


Sverre Midjord


Páll á Reynatúgvu


Hergeir Nielsen

Svarar ikki


Henrik Old

# Tingmenn sleppa ikki at forhála málið

**Edmund Joensen fer at arbeiða fyri, at uppskotið um Føroyar sum eitt valdømi kemur í gildi beinanvegin**

EITT VALDØMI

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

- Eg eri sera fegin um, at fólk tekur so væl undir við uppskotinum sigur Edmund Joensen, tingformaður og leggur aftrat, at hann sjálvur hevur ta fatan, at fólk meta, at hetta mál hevur stóran týdning fyri samfelagið. Tíðin er farin frá gomlu skipanini. Føroyar hava broytt seg til at vera eitt samanbundið meginland. Hetta er eitt mál, sum sjóvar føroyingar meira saman enn áður. Edmund Joensen heldur ikki atfinningarnar, sum eru komnar fram um, at hann ikki átti at lagt hetta fram, eru rættar, tí er tað nakað, sum tingformaðurin eigur at hava áhuga fyri, so eru tað skipaninar rundan um løgtingið. At fáa tingið at virka á allarbesta hátt, og ikki minst at fáa valskipanina, sum er sjálvt grundarlagið undir tinginum, at virka skilabest. -Tað vildi verið løgið, um ikki løgtingsformaðurin gekk á odda at fáa ta bestu og mest nútímans skipanina, soleiðis at fólkaræðið fær virkað á besta hátt. Hetta er ábyrgdin hjá tingformanninum, nú vit vita, hvussu eymt mál hetta er fyri tingmenn, flokkar og samgongur. Og fyri at hjálpa skipanini á veg, so er tað neyðugt, at onkur tekur ábyrgdina av at gera hetta. Tá nú allir flokkar hava givið signal um hetta og hetta er eitt mál fyri allar flokkar, so er tað einki minni enn mín skylda at taka hetta upp.

- Hvat nú um tað hendir, at høvuðstaðarøkið verður yvirumboðað við kanska 80% av tingmonnunum eftir val?

- Hatta er eitt hugsað dømi, sum sjálvandi ikki fer at henda. Sjálvandi fara økini eisini at hugsa um, hvørji umboð tey vilja hava. Norðingar og suðringar í Havn kunnu nú velja síni umboð í heimaoynni. Nú er tað púra opið, at fólk líkamikið hvar tey búgva fara og velja tey fólk, sum tey halda eru best egnað.

Edmund Joensen ber ikki ótta fyri, at málið skal verða forhálað og súltað í eini nevnd, soleiðis at tað ikki fer at virka frá komandi vali. – Vanliga fer slíkt mál í Rættarnevndina, men tá slíkt yvirskipað mál kemur fyri, so er møguleiki at velja eina grein 25 nevnd. Skipanin er annars so, at eitt mál kann ikki vera longur enn ein mánað í nevnd, uttan at løgtingsformaðurin gevur loyvi til tað. Kemur mál ikki úr aftur nevnd eftir hesa tíðarfeist, so kann tingið krevja, at tað kemur til 2. viðgerð. Annars kunnu nevndir fáa eyka tíð, um serligar umstøður gera tað, men heldur ikki hon er óavmarkað. Edmund Joensen roknar við, at málið verður avgreitt í oktober mánað, tá hevur tikið havt góða tíð til tað. Fær løgtingið fatan av, at onkur vil forhála eitt mál ella misbrúka skipanina, so sleppur viðkomandi ikki tað. Edmund sær onga orsøk til, at Rættarnevndin ella ein grein 25 nevnd brúka meira enn ta vanligu ásettu tíðina í tingskipanini til at avgreiða hetta málið, tí tað er eitt sera einfalt mál.